

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 07 - 2013

# Norra á odda við oljumenning

Norra fer at ganga á odda komandi árini, tá talan er um nýggjar oljuútbyggingar í Europa. Hetta sæst í tølum yvir útreiðslur til boring, sum í fjør vóru 50 mia. kr. og sum fara at hækka í 2016 til umleið 65 mia. kr. Norra fer at standa fyri stórum parti av hesum vøkstri við tilsamans 25 mia. kr. í 2016. Eftir Norra kemur Bretland við 20 mia. kr. Saman hava Norra og Bretland longu prógvað, at tey ganga á odda innan leiting og framleiðslu av olju og gassi í Europa. Tey bæði londini standa fyri umleið 75% av øllum boriútreiðslum í Europa. Londini bora eisini flest brunnar. Eftir tey koma Danmark og Háland. Hóast hetta stóra virksemið, so eru eisini stórar avbjóðingar fyri framan, tá tað um bæði leiting og útbyggingar ræður. Her serstakliga spurningurin um góðkenning frá EU, nú felagsskapurin er í ferð við at seta strangari krøv til oljuvirksemið til havs, hvørs umhvørvi er meira sárbart enn tað á landi. Nú norska oljudirektoratið, NPD, vil vera við, at nógv meira olja liggur í undirgrundini enn higartil mett, verður mett, at tað fara at verða gjørdar stórar nýggjar íløgur í leiting komandi 2-3 árini skrivar Offshore Energy.